# Dragin fekk eitt drekahøvd

Í gjárkvøldið kom skúlaskipið Dragin aftur av túri í Hetlandi og Oyrknoyggjum. Í Hetlandi vitjaðu teir í Aith, har Dragin fekk eina gávu, nevniliga ein gallíónsfigur. Hetta var eitt drekahøvd við gapandi kjafti, sum varð fest fram undir sprydið. Hátíðarhald var bæði á kaiuni og í bygdahúsinum aftan á at drekahøvdið var komið upp at hanga. Hildið verður at drekahøvdið er eitt satt listaverk, sum prýðir stevnið á Draganum. Frá Hetlandi varð siglt til Kirkwall í Orknoyggjum, har útferð varð gjørd til ymisk søgulig pláss sum t.d. Scapa Flow og steinaldarbydina Scara Brae. Túrurin aftur til Føroyar tók 33 tímar, rættiliga frískur vindur av suðri og útsynningi, so drekin fekk sjógv upp í kjaftin.





*Jóannes Eidesgaard segði í ólavsøkurøðuni, at føroyar eiga granskarar á høgum støði, men Føroyar eru langt aftanfyri onur framkomin samfeløg, tá tað snýr seg um at seta pengar av til hetta endamál*

# Milliard hvarv úr ólavsøkurøðuni

**Løgmaður staðfesti í ólavsøkurøðuni, at føroysk gransking fær ov fáar pengar, men milliardin, sum hann fyrr lovað granskingini frá einskiljingar inntøkum, var ikki nevnd. Hetta heldur Rúna Hilduberg, fráfarandi stjóri á Granskingarráðnum, vera syrgiligt**

GRANSKING

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tey seinastu tvey árini hevur løgmaður sagt í ólavsøkurøðuni, at ein grunnur skal setast á stovn at fíggja føroyskari gransking. Ein partur av inntøkunum frá einskiljingum skuldi setast í henda grunn. Men í ár var onki nevnt um henda grunn. Hetta undrar Rúnu Hilduberg, fráfarandi stjóra á Granskingarráðnum.

Løgmaður segði í ársins ólavsøkurøðu, at Landsstýrið hevur gjørt nógv við gransking við millum øðrum ætlanini at seta á stovn granskingarlund til vinnugransking. Og hann tosaði eisini um ætlanina at seta á stovn eitt yvirskipað vísindaráð og um týdningin av tættari samstarvið við ES.

Rúna Hilduberg gleðist um alt hetta, men tað hon serliga beit merkið í við løgmansrøðuni, var milliardin, sum ikki varð nevnt.

- Í 2005 segði løgmaður í ólavsøkurrøðuni, at landsstýrið ætlaði at seta ein grunn til at fíggja gransking, og at ein triðingur av inntøkunum frá einskiljingunum – upp til ein milliard krónur – skuldi setast í henda grunn. Nøkunlunda tað sama varð endurtikið í 2006. Men nú einskiljingarnar eru farnar í gongd, verður milliardin knappliga tagd burtur, sigur Rúna Hilduberg undrandi.

Størsti trupuleikin við gransking er manglandi fígging. Hetta staðfesti løgmaður eisini, tá hann segði, at Føroyar eru langt aftanfyri onnur framkomin samfeløg, tá tað snýr seg um at seta pengar av til gransking.

Men Rúna Hilduberg heldur ikki, at tað er nokk av Løgmanni bert at staðfesta, at Føroyar eru eftirbátur á hesum øki.

- Komandi samstarvið við ES hevur, sum sagt, alstóran týdning fyri fígginginga av føroyskari gransking. Men teir fíggja altíð bara ein part, og føroyski myndugleikarnir mugu taka sína ábyrgd í størri álvara, sigur fráfarandi stjórin í Granskingarráðnum.

- Hvar fór handa milliardin, sum granskingin fekk lovað í 2005, spyr Rúna Hilduberg, sum eftirlýsir ein yvirskipaðan granskingarpolitikk. Granskingarlundin, sum nú verður bygd, er eisini eitt dømi um hetta.

- Gransking krevur fígging og eitt sterkt granskingarumhvørvið. Vit fegnast um, at bygningurin kemur, men tað er sjálvandi ikki nokk. Hvør skal sita og granska í bygninginum, og hvørjir granskingarstovnar eru sterkir nokk at samstarva um hetta, spyr Rúna Hilduberg.

Hagtøl hjá Granskingarráðnum vísa, at Føroyar bert nýta 0,8% av bruttotjóðarúrtøkuni til gransking. Hetta liggur langt aftanfyri okkara grannalond. Danmark nýtir 2,6%, Ísland 3%, og Svøríki nýtir 4% av bruttotjóðarúrtøkuni til gransking.

## Gransking í ólavsøkurøðum hjá løgmanni

**2007**

Føroyar eiga granskarar á høgum støði, hóast tær eru langt aftanfyri onnur framkomin samfeløg, tá tað snýr seg um at seta pengar av til hetta endamál.

Landsstýrið hevur tí sett fokus á hetta økið við ætlanum um at skipa Lærda Háskúla Føroya, stovnseta granskingarlund til vinnugransking og fáa eitt yvirskipað vísindaráð at virka.

Ein týðandi vegur at menna føroyska gransking er at fáa í lag tættari samstarv við ES. Fyri at styrkja um hesa tilgongd hava vit sett serkøn fólk í Granskingarráðið og Mentamálaráðið at menna hetta samstarv.

**2006**

Landsstýrið fer at seta á stovn ein búskapargrunn, har serligar inntøkur til landskassan, eitt nú inntøkur frá einskiljingum og eini møguligari oljuvinnuni, fara í. Grunnurin skal millum annað nýtast til at standa ímóti við í verri tíðum, til at gjalda niður almenna skuld og til at fíggja gransking.

Gransking er eisini eitt øki, vit í sambandi við Visjón 2015 leggja stóran dent á at styrkja í framtíðini, og Vísindaráð Føroya verður sett í næstum. Vit hava nú fingið eitt ílegusavn, sum verður liður í at byggja upp eina ílegugransking í Føroyum.

**2005**

Landsstýrið ætlar at seta á stovn ein grunn til at fíggja gransking og nýmenning. Sum innskot í grunnin skal fara ein triðingur av inntøkum landskassans frá einskiljingunum - upp til 1 mia. kr.

Setast skal á stovn ein granskingarlund, sum skal leggja dent á lív- og ílegutøkniska gransking. Hesin stovnur skal hava ein miðsavnandi leiklut í at brúka granskingarúrslit til vinnulig endamál, og soleiðis gera sítt til, at føroyskar fyritøkur og vørur standa seg í aljtóða kapping.

Granskingarumhvørvið verður styrkt við m.a. at fáa í lag samstarv millum granskingarstovnar og lærda háskúlan. Somuleiðis er neyðugt at styrkja netverk og samstarv við útlond, millum annað við luttøku í ES-verkætlanum, har okkara samstarvsmøguleikar vaksa munandi, um vit sjálvi hava eitt sterkt og virkið granskingar-umhvørvi.

Til tess at samskipa játtanirnar til gransking skal verandi granskingarbygnaður umskipast. Sett verður á stovn Føroya Vísindaráð, ið skal orða yvirskipaða granskingarpolitikkin, raðfesta og veita fíggjartrygd. Í ráðnum sita løgmaður, avvarðandi landsstýrismenn og umboð fyri vinnu og gransking.